


## KOMANDI TILTØK

6. mai vitjar sendi-maðurin borgarstjórar, fyritøkur, stovnar o.o. í Vestfirðunum.

9. og 10. mai tekur sendimaðurin lut í felagsnevndarfundi (Hoyvíkssáttmálin) í Føroyum.

12. mai tekur sendimaðurin lut í "Europe Day" hjá ES-sendiharranum.

19. mai er sendimaðurin boðin til døgurða hjá finska sendiharranum í sambandi við, at teir finsku sendiharrarnir í norðurlondunum hava økisfund í Reykjavík.

## LANGTÍÐAR FÍGGJARPOLITIKKURIN LAGDUR FRAM

Fimm ára fíggjarpolitikkurin og fíggjarstrategiin hjá íslendsku stjórnini fyri almenna Íslandi varð lagdur fram fyri Altinginum 29. apríl. Endamálið er at tryggja vælferðina hjá komandi ættarliðum við at minka um almennu skuldina, minka um avgjøld hjá tí einstaka við at lækka og gera skattin meir rættvísan, styrkja sosialu skipanina og munandi styrkja grundleggjandi almennar tænastur, styrkja heilsuskipanina og styrkja um dygdina av útbúgvingunum.

*» Almenna bruttoskuldin niður í 30 % av BTÚ og avlopið á fíggjarlógini í 2017 verður 1,4 mia. DKK. Íløgur verða gjørdar fyri 4 mia. DKK næstu 5 árini, uttan at neyðugt er at útvega ríkiskassanum fleiri inntøkur «*

Stjórnin metir, at Ísland er í einari tryggari fíggjarligari støðu enn undanfarin ár og at inntøkurnar økjast støðugt. Tí metir stjórnin seg eisini hava rásarúm til at hækka um íløgurnar. Í alt ætlar stjórnin at gera íløgur í ymiskar ætlanir fyri uml. 4 mia. DKK (75 mia. ISK) frá 2017-2021 og tað er uttan at stjórnin skal finna nýggjar inntøkur.

Stjórnin vísir á 11 ymiskar íløgur sum fáa framíhjárætt komandi árini. Tær mest umfatandi íløgurnar vera á heilsuøkinum, har almenna heilsuhjálpin fær eina munandi fíggjarliga innspræning, hartil er ætlanin eisini at byggja eitt nýtt sjúkrahús, sum eisini verður tengt at Háskúla Íslands sum granskingarmiðdepil. Skúlakervið skal eisini endurskoðast og skal miðnámsskúlaútbúgvingin lækka frá fýra árum og niður í trý ár. Foreldur, sum fara í barnsburðarfarloyvi, fáa eisini betri fíggjarligar sømdir, um tey fara í farloyvi. Íbúðarmarknaðurin skal breiðkast, og møguleikarnir fyri leiguíbúðir skulu økjast. Skipið, sum siglir út til Vestmannaoyggjarnar, skal skiftast út. Trý nýggj eldrabýli skulu gerast í høvuðsstaðarøkinum. Ábøtur skulu gerast á vegakervið til og frá støðum, sum eru serliga dragandi hjá ferðafólki. Nýggjar tyrlur skulu keypast til sjóverjuna og ein tunnil skal byggjast um Dýrafjørð.

Samband

**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@tinganes.fo
www.tinganes.fo
Finn okkum á Facebook

## FILIPSOYGGJARNAR OG EFTA GJØRT FRÍHANDILSSÁTTMÁLA

Fyri stuttum kom fríhandilssáttmáli millum EFTA-londini og Filipsoyggjarnar. Ísland er ein partur av EFTA og síggja teir fleiri møguleikar við sáttmálanum. Eitt nú eru Filipsoyggjarnar tað landið, sum brúkar næst mest jarðhita. Hetta hevur longu fingið fleiri samstørv í lag millum Ísland og Filipsoyggjarnar, men tey samstørvini fáa nú upp aftur betri sømdir. Íslendska stjórnin sær eisini møguleikar í at útflyta fleiri fiskavørur og landbúnaðarvørur til Filipsoyggjarnar, nú tollurin er horvin. Samráðingarnar millum EFTA og Filipsoyggjarnar gingu yvir eitt heilt ár, og hava londini sjálvi gjørt innanhýsis sáttmálar sínámillum.

## LOYVT AT MERKJA ÍSLENDSKAR VØRUR VIÐ ÍSLENDSKA FLAGGINUM.



*Mynd 1. Íslendska merkið kann nú setast á íslendskar vørur*

Altingið hevur samtykt at broyta eina lóggávu, sum forsætisráðharrin hevur lagt fyri Altingið, um nýtslu av flagginum og ríkisskjaldramerkinum, til frama fyri íslendskar vørur. Framleiðarar kunnu nú prenta íslendska flaggið á sínar vørur uttan serligt loyvi. Hetta verður gjørt fyri at marknaðarføra vørurnar sum íslendskar. Hetta skal stuðla undir søluna av íslendskum vørum uttanlands og á heimamarknaðinum til tey mongu ferðafólkini sum vitja.
Eftirlitið við hesum ásetingum í lógini eru lagdar til Brúkarastovuna.

*Les meira her*

## ÓLAFUR RAGNAR GRÍMSSON FÆR STØRSTU UNDIRTØKUNA Í VELJARAKANNINGUM



*Mynd 2. Íslendski forsetin hevur góðar møguleikar at verða afturvaldur til komandi val.*

Í undanfarna mánaðarbrævi skrivaðu vit um komandi forsetaval í Íslandi, og nú er fyrsta veljarakanningin komin. Ólafur Ragnar Grímsson hevur bjóðað seg fram aftur og tað hevur havt stóra ávirkan á valið. Í kanningini fær Ólafur Ragnar 52,6% av atkvøðunum, meðan næst honum kemur Andri Snær Magnason við 29,4% og síðan kemur Halla Tómasdóttir við 8,8%. Tey trý fáa sostatt yvir 90% av atkvøðunum frá teimum spurdu.

Sambært kanningini eru tað lesandi og tey, sum eru búsitandi í høvuðsstaðarøkinum, sum atkvøða fyri Andra Snær, meðan Ólafur Ragnar hevur størri stuðul millum tey við lægri útbúgvingum og búgva uttan fyri høvuðsstaðin, meðan tað eru flestar kvinnur sum velja Hallu Tómasdóttur. Hini, ið eisini hava stillað upp, fáa øll undir 2% av atkvøðunum, sambært hesari kanningini.

Kanningin tykist at vera rímiliga greið og er Ólafur Ragnar greitt á odda, men hon skal tó takast við fyrivarni. Kanningin er gjørd í tíðarbilinum 22.-26. apríl og góvust tvey valevni í tí tíðarskeiðinum, teir fingu tó báðir undir 2%. Hartil var enn ein sending um panama-skjølini 25. apríl, har ið kona Ólaf Ragnar var nevnd í sambandi við at familja hjá henni er tengd at skattaskjólum. Tað er tó ilt at siga, um hetta fær nakra ávirkan og bendir alt higartil á, at Ólafur Ragnar eisini verður forseti eftir valið í juni, sum støðan er nú.

*Les meira og sí útgreinað úrslit her*

## MARS SETUR FERÐAFÓLKAMET




Í mars í ár vóru met nógvar hotellnætur seldar. Í mun til mars í fjør, eru tølini fyri seldar gistingar hækkað við heili 34%. Í alt vóru tað seldar 295.270 hotell gistingar í mars mánaði í ár um alt landið. Í sjálvum høvuðsstaðarøkinum var hækkanin 30%, og tað merkir at størsti vøksturin er úti kring landið. Tað eru bretar, sum keypa flest hotell gistingar, heili 86.000, meðan amerikanarar keyptu 63.000 gistingar og síðan týskarar, sum keyptu 20.300 hotellnætur. Tað er eisini áhugavert at tað økist so nógv uttan fyri vanliga høvuðsárstíð.

Hagstovan í Íslandi brúkar einans tøl frá hotellum, sum hava opið alt árið. Her er annars vanligt at summi hotell hava opið part av árinum og nógv ferðafólk leiga sær eisini íbúð tá tey koma. Hugsast kann tí at økingin er upp aftur størri, um alt verður roknað uppí.

*Sí meira og sí áhugaverdu hagtølini (á enskum) her*

## PANAMA SKJØLINI SPØKJA ENN Í ÍSLANDI.




*Mynd 3. Panama skjølini hava sett síni spor í Íslandi.*

Mánadagin, 25. apríl, var onnur sendingin í íslendska sjónvarpinum um íslendingar, sum eru tengdir at skattaskjólum. Higartil hava skjølini skakað íslendska samfelagið nógv, og seks navnframir íslendingar hava verið trýstir til at gevast í starvi sínum. Fýra av teimum vórðu trýstir úr starvinum áðrenn mánadagin, og tveir eru farnir eftir sendingina. Sagt verður, at fleiri hundrað íslendingar eru tengdir at skattaskjólum, og tí kann tað væl vera, at møguligar komandi avdúkingar fáa fleiri avleiðingar.

*Sí meira her*

## BRÚKARARÁÐIÐ HJÁ KT-LANDSNET VITJAR



*Mynd 4. Brúkararáðið hjá kt-Landsins á fundi í Sendistovuni.*

Brúkararáðið fyri Landsnet var á einari kunningarferð í Íslandi í tíðarskeiðnum 12. til 15. apríl fyri at kunna seg um, hvussu íslendingar hava uppbygt sítt kt-landsnetskervi og loyst sínar kt-avbjóðingar, serliga hjá tí almenna. Sendistovan gjørdi eina vitjanarskrá í tøttum samstarvi við Brúkararáðið. Sendistovan fyriskipaði vitjanirnar og hýsti fleiri av fundunum. Vitjað varð m.a.: Innlendismálaráðið, CERT-IS, Tollstjórin, RSK (TAKS), Reiknistofa Bankanna, Advania (fyrr Skyrr), Auðkenni, Reykjavíkar kommuna og Fíggjarmálaráðið.

Brúkararáðið var sera væl nøgt við vitjanina og fekk væl burturúr, og eisini vórðu nógv sambond knýtt millum partarnar, sum teir kunnu fáa nógva gleði av framyvir.

## FLAGGDAGSHALDIÐ 25. APRÍL



*Mynd 5. Rigmor Dam helt flaggdagsrøðuna og forsetin Ólafur Ragnar Grímsson vitjaði.*

Flaggdagshaldið, mánadagin 25. apríl, var sera væl eydnað. Veðrið vísti seg frá síni bestu síðu. Saman við hugnaligu kaféini, Café Flóra, sum liggur í náttúruvakra Grasagarðinum í Reykjavík, hevði sendistovan eitt væleydnað flaggdagshald. Gestirnir fingu høvið til at smakka føroyskar brellbitar og okkurt afturvið frá Føroya Bjór. Landsstýriskvinnan í Mentamálum, Rigmor Dam, helt flaggdagsrøðuna og umframt hana, hevði sendistovan eisini fingið Hallur Joensen, Kristinu Bærendsen og Jóan Petur Hansen (Beddi) til at spæla nøkur løg.

Veðrið var av tí allar besta og komu nógvir gestir, bæði føroyingar og nógvir íslendingar møttu til tiltakið. Forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, kom eisini til flaggdagshaldið. Flest allir sendimenn tóku lut, fleiri ráðharrar komu eisini, eins og fleiri Altingslimir eisini komu á gátt. Fitt av embætisfólkum vóru eisini til tiltakið. Um áhugi er at síggja myndir frá tiltakinum so liggja tær á facebookvanganum hjá sendistovuni, The Representation of The Faroes to Iceland (sí leinkju niðanfyri).

*Sí myndir frá tiltakinum her*

## ØL-SMAKKINGAR- OG TÓNLEIKATILTAKIÐ 25. APRÍL



*Mynd 6. Annika Waag greiddi frá Føroya Bjór o.a.*

Eftir flaggdagshaldið, skipaði sendistovan saman við Føroya Bjór fyri einum vinnuligum tiltaki. Endamálið var at kveikja upp undir samstarv ímillum Føroya Bjór og gastronomiska marknaðin í Íslandi, breiða út kunnleika til Føroya Bjór, samstundis sum føroyskur tónleikur var í miðdeplinum. Café Flóra var eisini karmur um hetta tiltakið og spældu Hallur Joensen, Kristina Bærendsen og Jóan Petur Hansen (Beddi) eisini til hetta tiltak.

Føroya Bjór og sendistovan høvdu sent innbjóðingar út, og tey sum møttu, fingu eina hugnaliga løtu saman, har gott høvi var til at royna tað ymiska, sum Føroya Bjór kann bjóða. Annika Waag greiddi meistaraliga frá tí, sum smakkað varð og frá søguni hjá Føroya Bjór, og sendimaðurin hevði eisini orðið.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**